

Sørin Bruun fær til uppgávu at skriva ein stíl um upplivingar sínar í summarfrítíðini. Hann velur at greiða frá eini summarlegu, har radisurnar — eisini hundurin Nuser, vóru við. Henda summarlegan gjørdist eitt sindur óvanlig. Eitt nú vunnu genturnar móti driengjunum í svimjikapping, og í rundbólti eisini. Hóast útlitini ikki vóru tey bestu fyri dreingirnar, so væntaðu teir kortini at vinna á gentunum, tá ítróttargreinin sjómanstak varð havd á lofti, tí her halda teir seg hava ein vinnara . . .

Fríggjakvøldið kl. 21.35:

Sunset Boulevard

Filmurin er frá 1950 og er vorðin ein klassikari í filmsøguni. Hann snýr seg um sambandið millum ein eldri, slitnan sjónleikara og ein yngri handritshøvunda í Hollywood.

Tað er Gloria Swanson, sumher stóð sína roynd í talifilminum, sum undurvakra Nora Desmond.

Hon livir í einbýli í einum stórum, óhugnaligum húsi í Hollywood, har Max er tænari. Hann var fyrsti maður, og leikstjóri hennara. Nora droymir um aftur at fara at gera filmarbeiði, í leikpartinum »Salome«, sum hon vil framføra á sín egna hátt. Hon fær ein ungan leikstjóra við sær. Tey gera fyrireikingararbeiðið, og brádliga er ungi leikstjórin húsvinur hjá Gloriu — ikki tí hann trýr serliga nógv um tað, sum Gloria hevur ætlanir um, men heldur tí hann hevur brúk fyri pengum hennara. Tey fáa kynsligt samband sínámillum, og hetta er atvoldin til, at tey bæði verða við undirlutan.

Fríggjakvøldið kl. 20.30:

Rok á gistingarhúsinum

Tað er John Cleese, sum hevur høvuðsleiklutin sum Basel í »Rok í gistingarhúsinum«. Hann hevur sjálvur saman við konu síni, skrivað handritið til sendirøðina.

Connie Booth spælir ung genta, sum eitur Polly. Hon fovinnur sær til lestnað við at arbeiða á gistingarhúsinum.

Spanski tænarin Manuel er eisini við í kvøld, og hann er førur fyri, — tá hann er raskastur, at siga seks orð á enskum! So er tað kona Basel, sum eitur Sibyl, sum altíð er tann, ið roynir at fáa gestirnar at kenna seg væl, tó at maður hennara Basil í heilum er so snurrutur.

Hugskotið til »Rok á gistingarhúsinum« fekk John Cleese í 1972, tá hann búði á lítlum hotelli í Torquay. Hann var við í sjónvarpssendirøðini Monty Python.

— Hotelverturin var so óforskammaður, at hann hugtók meg, sigur John Cleese. Tú fekst varhugan av, at gestirnir bert vóru sendir til hetta hotellið, fyri at arga vertin og forða honum í arbeiðnum.

Soleiðis er lætt at skilja rokið á gistingarhúsinum, og hvar John Cleese hevur funnið Basil, sum hann so avbera væl dugir at tulka.

Fríggjakvøldið 21.05:

Einstein ella Gud

Í dag er ikki óvanligt at hoyra fólk siga: Eg vil fegin trúgva upp á Guð, men nútíðar náttúruvísindi sigur mær, er rætt, at veitin millum átrúnað og náttum atrúnað og náttú uvísind í fleiri 100 ár, hevur gjørt tað trupult hjá fólki, at hava sína trúgv fyri seg sjálvan.

Í miðøldini var tað so lætt. Tað, sum tú visti, prógvaði tína trúgv. Vísindin var samantengd at trúnni. Tað var tí eisini lívsvandi, at seta seg móti, ella seta spurnartekin við hesi fyribrigdi. Tað noyddist Giordano Bruno, munkur í ár 1600 at ásanna. Hann varð brendur á bálinum fyri at víkja fyri síni røttu trúgv. Hann segði, at alheimurin var óendaligur. 33 ár seinni noyddist Galilei at nokta sína vitan um, at jørðin vikaði seg kring sólina og ikki umvent.

Kirkjan noyddist tó at gevast við sínum mótstandi, og er tað orsøkin til, at nútíðar náttúruvísindi hevur broytt heimsmyndina og givið menniskjum størri innlit í, hvussu veruleikin er bundin saman.

Nógv fólk halda, at trúgvin á Guð er vorðin minni, tí kappingin millum vísindini er so stór. Tey halda, at trúgv øðrumegin og náttúruvísind hinmeðin, eru tveir mótsettir polar, sum ikki kunnu ganga saman í eina eind: at náttúruvísind ger tað ómøguligt at trúgva. Tú noyðist at velja millum Einstein og Guð.

Hetta er evnið, sum Jørgen Thorgaard hevur tikið upp í samrøðu við Svend Andersen, dr. theol., ið sigur frá sínum sjónarmiði, hvussu trúgv og vitan kunnu trívast lið um lið, og hvussu hesi bæði eru neyðug, fyri at menniskjuni skulu skilja veruleikan.

sjónvarp

Fríggjadagin 17. august

19.30 *Radisurnar*
20.00 *Dagur og vika*
20.30 *Rok á gistingarhúsinum*
21.05 *Einstein ella Gud*
21.35 *Sunset Boulevard* s/h am. filmur
23.25 *Liðugt*

Tosa tey við stjórn teirra — so tosa vit við Reagan

Føroyska innslagið hesaferð var um Jazz festivalsetanina í Norðurlandahúsinum og brot burturúr framførslunum har. Í útvarpinum eru tey so væl fyri, at tey bert skulu hugsa um ljóðgóðskuna. Í sjónvarpinum er tað straks torførari, tí har hevur myndin so nógv at týða. — Tað er júst tí vit hava eitt sjónvarp! Í nøkrum førum vóru ljósviðurskiftini ov vánalig. Er tað tí sjónvarpsmanningin ikki heldur tað løna seg at seta eyka ljóskerald upp, — um bert tað snýr set um eitt lítið kut úr heildini? Um so er, so eiga teir at fara nágreiniligari um. Fáa teir loyvi at taka upp, so er uppgáva teirra at skipa so fyri, at vit »síggja« framførarnar og onnur fólk á skerminum. Annars er tað óneyðugt hjá sjónvarpinum at taka upp. Í síðsta broti hoyrdu vit frásøgumannin siga, at ein saxofonistur var í tónleikabólkinum.

Hann hoyrdu vit ongantíð, men vit hoyrdu ein spæla klaver, men tað sóu vit ikki!

Í sendingini SV-aktuelt um viðurskiftini millum stórveldini, var tað syrgiligt at ásanna, hvussu lítið fólk í hesum báðum londum vita um hvørt annað.

Lítil ella eingin upplýsing hevur bert eitt við sær, — nevniliga at sáa misálit. Hetta er júst veruleiki í sendingini. Ein amerikansk genta helt, at bert sovjettisku børnini vildu tosa við stjórn teirra um ikki at elva til kríggj, so skuldu tey tosa við Reagan. Hetta merkir, at fólk báðu megin jarntjaldið hava álit á tí vanliga fólkinum, men ikki á stjórnunum, heldur ikki í egna landi. Um tað ikki er atvoldin til, at stjórnirnar halda fólkið í óvitsku, so veit eg ikki! Hetta er kanska júst tað stjórnir vilja, fyri at fáa frið at økja um vápnadubbingina og at fáa pening til framleiðslu av vápnum.

Sendingina hevur Danmark, Noregi og Svøríki gjørt í felag, og tað skuldi verið haldgott prógv fyri innihaldinum at stórveldini ikki vóru íblandað. Stórur munur var tó á medferðini hjá skúlabørnunum, at tey sovjettisku vóru meira bundin og smæðin enn amerikansku børnini. Tey eru so von við sjónvarp, at tey ikki taka sær tikni av at eitt myndatólk kemur inn í skúlastovuna.

Ein sovjettiskur blaðstjóri tosaði um fyribrigdið propaganda nevndist McCarthy, og hann hevur sett síni spor á medvitið hjá fólki í USA, hóast tað nú eru umleið 30 ár síðan hann herjaði har í londunum!

Ein vitjan var í Rotary felag í USA, har ein amerikanari hevði vitjað í Sovjetsamveldinum. Tað var so fyrstu ferð, at eg hoyrdi gamla Josef Stalin nevndan Joe. Uppskakandi var tað at eygleiða landsmenn hansara, sum østu seg upp, bert russar vóru nevndir. Teir áttu í Amarika eisini ein góðan propagandist, sum nevndist Macharty, og hann hevur sett síni spor á medvitið hjá fólki í USA, hóast tað nú eru umleið 30 ár síðan hann herjaði har í londunum!

Sendingin um stórveldini er í trimum pørtum. Áhugavert verður at síggja og hoyra, hvat kemur burturúr, tá sendirøðin er at enda komin. Vónirnar nýtast tó ikki at vera so bjartskygdar, tí vansin báðu meðni er, at fólkið veit so lítið um hvørt annað, — her hugsað um vanliga amerikumannin og vanliga sovjetborgaran. Men tað er so altíð eitt sjónarmið, sum ein kann gera sær sínar egnu metingar út frá.

Dagny Joensen